Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting: 30.01.2024
Mál nr.: 23/19640
Málsviðgjørt: TVR

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 91 frá 21. desember 2004 um kringvarp, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 26. mai 2010 og løgtingslóg nr. 163 frá 24. desember 2015, verða gjørdar hesar broytingar:
	1. Í § 2, stk. 4, § 4, stk. 1, § 4, stk. 2, nr. 3, § 4, stk. 3, tvær staðni í § 4, stk. 6, § 8, stk. 8, § 10, stk. 5, § 15, stk. 1 og 3, § 16, stk. 2, tvær staðni í § 16, stk. 3, § 16, stk. 4 og § 19, stk. 5 verður "Landsstýrismaðurin" broytt til: "Landsstýrisfólkið".
	2. Í § 4, stk. 2, nr. 1, § 5, stk. 2, § 11, stk. 2 og § 15, stk. 2 verður "landsstýrismaðurin" broytt til: "landsstýrisfólkið".
	3. Í § 4, stk. 7, § 9, stk. 1 og 2, § 11, stk. 1 og § 16, stk. 1 verður

	"landsstýrismanninum" broytt til: "landsstýrisfólkinum".
§ 7. Allir likamligir persónar í aldursbólkinum 24 til og við 66 ár við fullari skattskyldu sambært § 1 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt hava skyldu at rinda kr. 150,00 um mánaðin í kringvarpsgjaldi, sbr. stk. 4-6. Skyldan at rinda kringvarpsgjald tekur við tann fyrsta mánaðin eftir, at persónur er fyltur 24 ár. Undantiknir skylduni at rinda kringvarpsgjald sambært 1. pkt. eru persónar, sum vegna útbúgving fyribils hava tilhald uttan fyri Føroyar. *Stk. 2.* Skyldan at rinda kringvarpsgjald sambært stk. 1 er kr. 50,00 um mánaðin fyri persónar, sum eru 67 ár ella eldri. Skyldan at rinda kringvarpsgjald tekur við tann fyrsta mánaðin eftir, at persónur er fyltur 67 ár. *Stk. 3-5.* ...	**4.** § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Allir likamligir persónar í aldursbólkinum 24 ár og fram til aldurin sambært stk. 2, ið hava fulla skattskyldu sambært § 1 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, hava skyldu at rinda kr. 163,00 um mánaðin í kringvarpsgjaldi, sbr. stk. 5-6. Skyldan at rinda kringvarpsgjald tekur við tann fyrsta mánaðin eftir, at persónur er fyltur 24 ár. Undantiknir skylduni at rinda kringvarpsgjald sambært 1. pkt. eru persónar, sum vegna útbúgving fyribils hava tilhald uttan fyri Føroyar. *Stk. 2.* Skyldan at rinda kringvarpsgjald sambært stk. 1 er kr. 63,00 um mánaðin fyri persónar, sum eru í fólkapensjónsaldri sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. Skyldan at rinda kringvarpsgjald sambært hesum stykki tekur við tann fyrsta mánaðin eftir, at persónur hevur rokkið tann í 1. pkt. nevnda aldur.
§ 7. ... *Stk. 2.* ... *Stk. 3.* Landsstovnar, sjálvsognarstovnar, interkommunalir felagsskapir, kommunalir stovnar og feløg sambært § 5 í løgtingslóg um partafeløg og smápartafeløg (vinnufeløg) rinda eitt árligt kringvarpsgjald til Kringvarp Føroya, sbr. stk. 4-5. Árliga kringvarpsgjaldið hjá løgfrøðiligum persónum sambært 1. pkt. verður ásett eftir samlaðu árligu lønarútgjaldingunum hjá viðkomandi løgfrøðiliga persóni árið undan innkrevjingarárinum, sbr. nr. 1-7: 1)-7)... *Stk. 4-5.* ...	**5.** Í § 7, stk. 3, 1. pkt. verður "stk. 4-5" broytt til: "stk. 5 og 6".
§ 7. ... *Stk. 2-3.* ... 1)-4) ... 5) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 500.000,00 kr. og 999.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 3.500,00, 6)-7) ...	**6.** Í § 7, stk. 3, nr. 5 verður "kr. 3.500,00," broytt til: "kr. 3.000,00,".

Stk. 4-5. ...	
§ 7. ... *Stk. 2-3.* ... 1)-5) ... 6) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 100.000,00 kr. og 499.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 2.000,00 ella 7) ... *Stk. 4-5.* ...	**7.** Í § 7, stk. 3, nr. 6 verður "kr. 2.000,00" broytt til: "kr. 1.500,00".
	8. Í § 7 verður aftan á stk. 3 sum nýtt stk. sett: "*Stk. 4.* Tann 1. januar á hvørjum ári verða gjaldsupphæddirnar sambært stk. 1 og stk. 2 prístalsjavnaðar við tveimum prosentum í mun til ta seinastu gjaldskyldugu upphæddina árið fyri. Árliga gjaldsupphæddin verður rundað til nærmasta heila krónutal." Stk. 4-5 verða eftir hetta stk. 5-6.
Galdandi orðingar	**9.** Í § 11, stk. 1 verður "Landsstýrismanninum" broytt til: "Landsstýrisfólkinum".
Galdandi orðingar	**10.** Í § 23 verður "landsstýrismannin" broytt til: "landsstýrisfólkið".